# Oljupengar fyrst og fremst til at menna útjaðaran

**Skotar hava vunnið nógvar pening úr oljuni. Tað er so í evsta tíma, at teir hava innsæð, at hesin pengingur er væl givin út, tá hann kemur útjaðaranum til góðar. Tað eiga vit at leggja okkum í geyma longu nú, áðrenn oljavinnan hevur tikið dyk á seg heldur formaðurin í Vinnunevndini**

VINNUNEVND Á FERÐ
*Jan Müller*



*Umboð fyri Vinnunevndina og Oljumálastýrið saman við føroyingum í Bretlandi á vitjan í Peterhead*

Í farnu viku var Vinnunevndin og umboð fyri Oljumálastýrið á kunningarferð í Skotlandi. Formaðurin í nevndini, Henrik Old er sera fegin um ferðina og heldur hann, at Oljumálastýrið, sum átti stóran part av fyrireikingini, eigur stóra tøkk fyri sítt professionella arbeiði. Skráin varð sera fjølbroytt og varð vitjað á fleiri plássum, har umboðini fingu innlit í bæði fiskivinnu, oljuvinnu og útjaðaramenning. Henrik Old vísir á, at Vinnunevndin er tann tingmannanevndin, sum fevnir mest víða og tí var tað eisini umráðandi at brúka ferðina til eina breiða kunning innan fleiri samfelagsøki. Alt tað, sum tríggir landsstýrismenn takast við, endar í Vinnunevndini tvs. teir, sum umsita fiskivinnu, vinnumál og oljumál. Hann dylur ikki fyri, at nevndarlimirnir heimafturkomnir hava víðkað sín sjónarring og hava fingið eina vitan, sum teir kunnu fáa nógv brúk fyri í sínum arbeiði á tingi.

Vitjað varð á fiskamarknaðinum í Peterhead, á gassterminalinum í St. Fergus, á høvuðskrivstovunum hjá oljufeløgunum Amerada Hess og Agip og hjá Robert Gordon Intitute of Technology, sum er ein trygdarvenjingarstøð. Vitjanin á Robert Gordon stovninum fyri trygd nakað varð nettup nakað, sum Vinnunevndin hevði stórt gagn av, tí trygdarspurningar fevna bæði um fiski- og oljuvinnu.

## Útjaðarin

Formaðurin í Vinnunevndini heldur vit hava nógv av læra av skotum á teimum ymsu økjunum og her hugsar hann ikki minst um tað arbeiði, sum verður gjørt fyri at betra um trivnaðin á smáplássunum og á teimum mongu oyggjunum kring Skotland. Her er nevniliga eitt ótal av oyggjum, sum eru í sama báti sum fleiri av útjaðaraoyggjunum í Føroyum og har størsti trupulleikin hevur verið fráflytingin av teimum ungu. Tey ungu fara til stórbýirnar at nema sær útbúgving og koma so ikki aftur. Myndugleikarnir hava sett nógvar pengar av til at bøta um henda óhepna útviklingin. Sjálvur heldur Henrik Old, at hetta er nakað, sum vit eiga at taka upp í Føroyum eisini, nevniliga hetta at raðfesta útjaðaraøkini hægri við at seta munandi peningaupphæddir til ymisk endamál. Ikki sum í dag, har man nú hevur fingið ein landsstýrismann at taka sær av útjaðaramálum, og har tað so bert verða settar 300.000 kr. til hetta øki á fíggjarlógini. Hevði upphæddin verið 3 mill. kr. so var tað nakað at tosa um. –Nú var landsstýrismaðurin í útjaðaramálum við á ferðini, so hann hevur fingið nakað at hugsa um, nú hann hevur sæð, hvussu næstu grannar okkara raðfesta útjaðaramenningina.

## Tey ungu

Henrik Old heldur, at tey á ferðini fingu gott innlit í tær broytingar, sum eru farnar fram í eitt nú Aberdeen, síðani oljan tók dyk á seg og yvirhálaði fiskivinnuna. Hann vísir á, at støðan í býnum í dag er tann, at tú skal hava sera høga inntøku fyri at klára teg, og tað ger, at tey ungu, sum ikki hava arbeiði í oljuvinnuni og sum skulu til at fáa tak yvir høvdið, eru sera illa fyri. Tey hava sera ringt við at fáa fótafesti uttan so at tey fáa eitt arbeiði við sera høgari løn. Støðan hjá teimum yngru í Aberdeen líkist nógv henni hjá teimum ungu, sum skulu etablera seg í Havn. Hesi skulu brúka alla sína tilveru fyri at fáa tak yvir høvdið og er tað heilt burturvið.

Men so skjótt man kemur longur burtur frá Aberdeen, so verður hetta øðrvísi. Menningin í býnum hevur verið øgilig, uppá gott og ilt. Hon er sjálvandi komin væl við hjá mongum, men hini, sum ikki hava høga inntøku í hesi nýggju vinnu, hava ikki fingið tað betri, tá hugsað verður um at seta fót undir egið borð. Meira enn 50.000 fólk eru flutt til býin.

## Hugsa okkum væl um

Formaðurin í Vinnunevndini heldur, at vit føroyingar mugu hugsa okkum ómetaliga væl um, fáa vit nógvar pengar um hendi frá eini oljuvinnu. Hann heldur, at tað var rætt at seta í lógina, at alt virksemi skuldi um føroyskan kaikant, og at tað heldur skal vera møguleiki at gera undantak frá tí, um tað verður hildið rætt. Hann heldur tað vera burturvið nú at tosa um at taka hetta krav úr lógini, tí tá standa vit heilt á berum. Verður nógv gass funnið og spurningurin verður um tað skal flytast til lands, so er tað nakað, sum vit ikki skulu taka støðu til her og nú men heldur nakað, sum má standa opið til ta tíð. Gassterminalurin í St. Fergus er øgiligur, og er tað ivasamt, um hetta er tað føroyingar ynskja. Men tingmaðurin heldur, at hetta er nakað, sum okkara myndugleikar skulu hava møguleika at avgera í framtíðini. Tað skal vera ein samráðingarmøguleiki við oljufeløgini, har man nú einaferð letur og gevur og tekur.

– Men tað krevur umhugsni. Sjálvur trúgvi eg, at fáa vit ikki pengar til at brúka at menna útjaðaran við, so er illa vorðið. Skulu oljuinntøkur bara brúkast til at menna tað, sum er í miðjuni av landinum og sum frammanundan er ment nógv, so er einki vunnið í hesi vinnu. Eitt tað mest týðandi við oljuvinnu her má vera, at útjaðarin fær betri umstøður. Hetta er nakað vit kunnu læra av skotum. Teir hava tikið í nakkan á sær sjálvum og siga, at her mátti henda nakað. Tað er helst í síðstu løtu, tí teir síggja, at útjaðarin er við skerdan lut. Tí koyra teir stórar pengaupphæddir til útjaðaramenning. Henrik Old heldur ikki tað er nøkur orsøk til at økja meira um virksemi í miðøkinum, tí her er nóg nógv virksemi sum er. Í dag er tað bert miðøkið, sum hevur fingið nakað burtur úr oljuvinnuni. Sohvørt hon mennist má hetta eisini broytast.

Nú er kanska í so tíðliga at tosa um framtíðina, tá vit ikki vita, hvussu verður við oljufundum á føroyaøkinum, men verður olja funnin og framleiðsla fer í gongd, so ivast Henrik Old ikki eina løtu, at oljufeløgini fara at brúka eitt nú Suðuroynna í sambandi við sítt virksemi, nú hon helst fer at liggja næst oljufeltunum.

Nú hann er komin heimaftur spurdu við Henrik Old, hvat hann serliga hevur lagt sær í geyma á ferðini. -Áðrenn eg fór hugsaði eg nógv um, hvat vit kunnu gera fyri, at Føroyar ikki minka enn meira. Eftir hesa ferðina eri eg sannførdur um, at tað ber til at forða fyri hesi gongd, sjálvt um tað eru fleiri, sum halda, at alt fer at laga seg. Í sambandi við oljuvinnuna mugu vit ansa ómetaliga væl eftir, at ein slík nýggj vinna ikki kollrennur eitt so lítið samfelag. Ein dag er eingin olja eftir. Man krevur tí at ansa eftir ikki at gera alt samfelagið bundið at hesi eini vinnuni.

## Vinarligir og ærligir

Formaðurin í Vinnunevndini hevur alt gott at bera skotum. Sjálvur hevur hann havt samband við skotar seinastu 30 árini hann hevur virkað í fiskivinnuni og heldur fyri, at í teimum hava við bæði vinir og góðar samstarvsfelagar. Her vísir hann serliga til teirra góða og ærliga lyndi. Hevur tú gjørt eina avtalu við ein skota so heldur hon. Annars kendist tað ikki so galið hjá føroyingunum at vitja í Skotlandi so stutt eftir, at vit fingu javnleik í fótbólti. Hetta gjørdi, at skotar hugdu eitt sindur "skeivt" uppá føroyingarnar. Ella vísit teimum virðing.

Henrik Old heldur tað vera rætt at menna samvinnuna við okkara næsta granna, bæði á tí vinnuliga og tí mentanarliga økinum. Hann fegnast tí um, at bæði Atlantic og Smyril Line byggja brýr millum londini, sum skulu stuðla uppundir hesa menning.

Heimafturkomin er ov mikið at tríva í av arbeiði í Vinnunevndini. Sjálvur dámar formaðurin sera væl hetta arbeiði, tí alt, sum nevndin tekst við, hevur nakað við lív at gera. – Sjálvur eri eg ein rættiliga livandi persónur, og at skula stíla fyri arbeiðinum í Vinnunevndini er nakað, sum hóvar mær serstakliga væl antin tað so er í undirgrundini, í sjónum og omaná sigur ein opinskáraður og fegin Henrik Old.



*Blíðskapurin var óførur.*
*– Skotar eru ærligt og vinsælt fólk, sum føroyingar eiga at samstarva meira við heldur Henrik Old*



# Nú skulu Føroyar marknaðarførast

**Skotlands dysturin hepnaðist sum heild væl, og í Týsklandi, Skotlandi og Íslandi hevur føroyska ferðavinna stórar ætlanir, sigur Sissal Kristiansen, sum er samskipari av føroyska ferðavinnu átakinum í sambandi við dystirnar hjá landsliðnum**

FERÐAVINNA
*Heri á Rógvi*



*Sissal Kristiansen er sett at samskipa átakið hjá føroysku ferðavinnuni í sambandi við fótbólts landsdystirnar. Hon sigur, at tað var mestur Týskland, ið gjørdi at farið varð undir átakið.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Føroyska ferðavinnan ætlar at gera sær dælt av nýggja bólkinum hjá føroyska A-landsliðnum í fótbólti. Hetta hava teir í fleiri førum gjørt púra greitt.

Partar av ferðavinnuni, eitt nú Atlantic Airways og Smyril Line, hava saman við Ferðaráð Føroya skipað ein áhugabólk, sum hevur til endamáls at marknaðarføra Føroyar og føroyska ferðavinnu í sambandi við dystirnar hjá landsliðnum.

Miðjað verður eftir týskarum, skotum og íslendingum. Tað verður sum so einki gjørt við Litava.

—Vit fara eftir marknaðunum í Týsklandi, Ísland og Skotlandi, tí hetta eru marknaðir, har vit fyri ein part longu gera okkum galdandi, og her kunnu vit eisini vónandi skapa ein meiráhuga, sigur Sissal Kristiansen.

Hon er sett í hálvtíðarstarv at taka sær av hesari kampagnuni í sambandi við landsdystinar. Uppgávan hjá henni er at koma við hugskotum, skipa fyri og at føra alt út í lívið. Hon hevur samband við tey ymsu fótbóltssambondini og onnur, ið hava við fyriskipan av dystinum at gera.

Hon letur annars væl at úrtøkuni móti Skotlandi, og her verður ikki hugsað um úrslitið av dystinum.

—Eg haldi, at vit megnaðu at skapa eina ógvuliga positiva mynd av Føroyum, sigur Sissal.

Tað eru tó ikki fótbóltsáskoðarar, sum samtakið leggur seg eftir at fáa hendanvegin. Sissal hevur sjálv ferðast ógvuliga nógv runt við útlendskum journalistum, ið umboð fyri tað nógva størri fjølmiðlar av øllum slag.

Teir skulu so skriva um Føroyar, og hetta skal skapa umtalu. Higartil hava afturmeldingar verið ógvuliga góðar, sigur Sissal. Ætlanin er at fólk flest í teimum londunum skulu fáa eyguni upp fyri Føroyum.

Frá Atlantic Airways verður upplýst, at nógv hava ferðast millum Skotland og Føroyar. Størsti parturin av hesum vóru oljuarbeiðarar í fjør, men eisini fleiri privat ferðast. Í sambandi við dystin ferðaðust eini sekshundrað skotar við Atlantic Airways. Harav ferðaðust fleiri ein rættiligan umveg fyri at koma til okkaru átjan oyggjar.

## VIP

Sum nevnt verður ikki nógv gjørt burturúr Litava, men í Týsklandi haraftur-ímóti verður nógv gjørt burturúr.

Flestum kunnugt skal Rúni Brattaberg syngja føroyska tjóðsangin solo á vøllinum í Hannover. Hetta er als ikki vanligt í fótbólti, men føroyska ferðavinnusamtakið ivaðist ikki, og týska Fótbóltssambandið vildi fegið loyvi føroyingum hetta.

—Tað er ógvuliga umráðandi, at vit tora at vísa, at vit eru nakað. Vit hava okkara egna land og egna mentan, og vit mugu nýta hendan sýnisgluggan, sigur Sissal Kristiansen.

Í sambandi við dystin móti Týsklandi komandi mikudag verður eisini skipað fyri einari reseptión, har ymiskt føroyskt verður sýnt, eitt nú føroysk klædnapløgg.

Talan verður um eitt slag av einum VIP-tiltakið, har fínir gestir støkka inn á gólvið. Til øll londini er faldari eisini gjørdur um Føroyar.

## Konsertir

Tá føroyska landsliðið komandi ár fer til Íslands og til Skotlands at leika, so er ætlanin at skipa fyri konsertum við føroyskum bólkum og einstaklingum. Væntandi verða tað Eivør Pállsdóttir og Brandur Enni, men hetta er ikki endalig greitt enn.

Sissal Kristiansen sigur, at tey royna at fáa mest burturúr øllum dystunum á heima- og útivølli.

Talan er um eina stóra verkætlan, ið føroysk ferðavinna hevur sett í verk í sambandi við dystirnar, men vónirnar eru góðar um, at hetta fer at løna seg.



*Fokus skal rættiliga setast á Føroyar. Umframt ítróttapressuna koma eisini onnur fjølmiðla fólk at fortelja stóru verð um Føroyar.*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*

## Dystirnir

**Hesir eru dystirnir, ið landsliðið hevur eftir at leika:**

10. oktober 2002
Litava-Føroyar

16. oktober 2002
Týskland-Føroyar

07. juni 2003
Ísland-Føroyar

11. juni 2003
Føroyar-Týskland
(á Tórsvølli)

20. august 2003
Føroyar-Ísland
(á Tórsvølli)

6. september 2003
Skotland-Føroyar

10. september
Føroyar-Litava
(á Svangaskarði)

# Skeið í buffét

**Á skúlaheiminum við Marknagilsvegin eru tey farin á skeiði í buffét**

SKEIÐ
*Heri á Rógvi*

Týsdagin og mikudagin halda Laila Hyllekvist og Ingrid Petersen skeið á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Tær geva frálæru í nýggjum hugskotum í matgerð av spennandi rættum, borðreiddir í fati til m.a. jólaborðhald, frokostbuffét, “grønum” rættum við max 30% fiti innihald o.a.

Á skeiðinum verður bæði undirvíst í teori og køkspraktik fyri at geva luttakarunum eina hægri kvalifisering, geva íblástur til nýggj hugskot og spennandi boð uppá matgerð av heitum/flógvum rættum í fati.Endamálið er eisini at geva íblástur til eitt meira fjølbroytt menukort/køksmataseðil við nýggjum heitum/fløvum rættum.

Fyrireikararnir hava eisini bjóðað umboðum fyri Sosialin at smakka, hvat tey hava fingið burturúr, og tað frætta lesararnir sjálvandi eisini um.

Mikudagin - í dag – verður høvi hjá fólki at støkka inn á gólvið á Skúlaheiminum at royna buffétina fyri døgurðaprís.



*Tað verður forkunnug buffét á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.*